# Vilhelm Nielsen

## er farin



Mikumorgunin tann 18. desember bórust boðini, at Vilhelm Nielsen, fyrrverandi løgtingsmaður úr Sandavági, var farin. Sjálvur var eg í tinginum henda dag, undarligt kendist tað at síggja merkið á Tinghúsvøllinum í hálvari stong, tí bygda- og skyldmaðurin var farin.

Vilhelm var yngstur av 8 systkjum, tey hvíla nú øll í Harrans navni, foreldur teirra vóru Dánjal Petur, skómakarin, og Anna Sofía úr Bartalstovu.

Tann 28. august fylti Vilhelm 90 ár - eg var og heilsaði upp á Vilhelm hetta kvøldið - hugaligt var át lýða á, tá Vilhelm so livandi greiddi frá sínum fyrsta túri undir Vestmannasundi, P/f Vágatunnilin hevði bjóðað hesum stríðsmanni ein túr undir Sundinum á føðingardegnum, eisini greiddi hann frá, tá ið Haldor Hansen, sáli, og hann løgdu fram uppskot um heingibrúgv um Vestmannasund.

Sera væl hevur Vilhelm fylgt við, hvussu arbeiðið at borða undir Vestmannasundi hevur gingist, hvørja viku vitjaði hann Dánjal á Sjúkrakassanum fyri á telduni at síggja, hvussu langt arbeiðið var komið.

Eg minnist Vilhelm best frá síni trúgvu tænastu sum deknur í Sandavágs kirkju, hesa tænastu tók hann upp eftir faðir sín, og røkti trúgvur hesa tænastu til ellisár, sera hugnaligt var at sita og líða á, tá Vilhelm við síni eyðmjúku rødd, sunnudag eftir sunnudag, las lestur.

Eisini gjørdu Marianna og Vilhelm eitt stórt arbeiði við sunnudagsskúlan í Sandavági og somuleiðis fyri Meinigheitshúsið.

Vágafólk minnast Vilhelm, sum ein arbeiðssaman og rokutan arbeiðsmann, um heystarnar rann hann sum ein unglingi við skinnum bæði tíðliga og seint, á Vilma dugdi hann alt, hann skrúvaði maskinurnar sundur og saman, hann bant við maskin, hann seymaðu burturúr skinnum, hann førdi sín roknskap fyri virkið, ja har dugdi Vilhelm alt.

Vilhelm og Marianna høvdu diamantbrúðleyp í apríl í ár, nógv vóru tá og heiðraðu diamantbrúðarparið, tey hava bæði verið merkt av sjúku ta seinastu tíðina. Áðrenn sjúkan fór at gera um seg, vóru tey tíðum at síggja hond í hond í Sandavágstúni - henda bygdarmynd er nú ikki meir.

Vilhelm og Marianna áttu fýra børn: Paula, Sólgerð, Sofus og Ann, tit hava mist ein góðan mann og pápa, má Harrin styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

Hvíl í friði

**Jóanis**

VIÐMERKINGAR

# Fyrstu familjupolitisku tiltøkini sett í verk

**Henrik Old**



Fyri at politiska kabalin skuldi ganga upp, tá landsstýri var skipað, so var ein av neyðloysnunum at nýtt familju- og trivnaðarráð sá dagsins ljós. Hetta serliga fyri at bøta um korini hjá barnafamiljum og teimum lægstløntu, og fyrstu tiltøkini vísa seg nú sum jólagáva til fólkið. Tiltøk sum líkna mest teimum í neyðugt var at seta í verk tá kreppan leikaði harðast á.

Tað fyrsta er at hvørt húski skal gjalda kr. 500 eyka í sjónvarpsgjaldi, ein hækking uppá 33% sum er met. Men hetta var bara byrjanin. Hjá tímløntum kvinnum, sum skulu í barsilsfarloyvi minkar útgjaldi í barsilstíðini munandi, eftir at seks mánaða regilin er tikin burtur. Ikki ein gang fekst undirtøka fyri einum uppskoti um at seks mánaða reglan skuldi halda fram einans fyri tey tímaløntu. Onkur helt at tað fóru Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin at stemma fyri - men nei.

Samtíðis verður boðað frá at mjólkaprísurin verður hækkaðar við 50 oyru liturin. Sjálvandi krevja nýføðingar hjá tímaløntum og lágløntum ikki tað sama sum hjá okkum øðrum.

Harumframt var ein serliga jólagáva til útjaðaran. Frá nýggjárinum av skal ferðaseðlaprísum hjá Strandferðsluni hækkast við minst 15%´um, so ikki kann sigast annað enn at fyrstu familjupolitisku tiltøkini royndust væl.

# Rættleiðing til Ellint Abrahamsen

**Jákup Sólstein**
*formaður í Føroya Reiðarafelag*



Við tað, at formaður Føroya Skipara- og Navigatørfelags, Ellintur Abrahamsen, ferð eftir ferð - seinast í "Degi og Viku" 19. december 2002 - setir fram skuldsetingar móti Føroya Reiðarafelag um, at Reiðarafelagið ikki heldur seg til gjørdar avtalur og eisini einvíst skal hava gjørt broytingar í tí sáttmála, undirskrivaður varð 19. jan. 1999, sær felagið seg noytt til at koma við rættleiðing til tað, ið framført verður.

Hin 12. januar 1999 gjørdu 5 partar avtalu um nýggjan 2 ára sáttmála. Hesir vóru: Føroya Fiskimannafelag, Maskinmeistarafelagið, Føroya Motorpassarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag. Við tað, at samráðingarfólkið hevði sitið í 48 tímar út í eitt og allur sáttmálateksturin móti endanum varð skrivaður av nýggjum, kom uppskot frá semingsmanninum John Rajani um, at partarnir undirskrivaðu eitt eintak av einsljóðandi sáttmálum, fyri formelt at hava endað samráðingarnar. Hann vísti síðani á, at við tað at so rúgvusmikið tekst- og taltilfarð var gjørt, var vandi fyri, at onkrar villur, ið onki høvdu við sjálva avtaluna at gera, høvdu snýkt seg inn í undirskrivaða eintakið. Hann setti tí sum treyt fyri at enda semingina, at partarnir samdust um, at tað skuldi verða møguligt eftirfylgjandi at **"rætta møguligar villur og skeivar orðingar".** Hetta vóru allir partar samdir um, og so varð undirskrivað.

Tað vóru rættuliga nógvar villur, ið vóru staðfestar, og hesar vóru fráboðaðar semingsstovninum, sum síðani gjørdi neyðugu rættingarnar og sendi feløgunum nýggja sáttmálatekstin 4. februar 1999. Síðani tá hava limir Føroya Reiðarafelags havt og virkað eftir einsljóðandi galdandi sáttmálum við Fiskimannafelagið, Maskinmeistarafelagið, Motorpassarafelagið og Navigatørfelagið.

Men formaður Føroya Skipara- og Navigatør-felags, Ellintur Abrahamsen leyp frá gjørdari avtalu og kravdi, at "undirskrivaða eintaki incl. villur og skeivar orðingar" skuldi verra galdandi, og harvið hevur hann og felag hans-ara gjørt tað sera trupult at finna nakað samráðingargrundarlag, nú sáttmálin er farin úr gildi. Spurningurin er, hvønn sáttmála tosað verður um. Hann hevur eisini, nú beint undan samráðingunum, biðið fútan staðfesta "skeiva sáttmálan".

Føroya Reiðarafelag kann og fer ikki at seta sítt trúvirði uppá spæl. Tað skyldar felagið teimun manningarfeløgum, ið ikki hava gjørt sær dælt av støðuni, og tí ikki kravt nakað, ikki varð avtalað.

Um limir í Føroya Skipara- og Navigatørfelags kunnu liva við, at felag teirra førir seg fram á slíkan hátt, verður upp til teirra at avgera, men tað er greitt, at hetta er ikki við til at skapa gundarlag fyri góðum samstarvi.

# Stríðseinglar

*Rættvísis stríðseingil mikli*
*-stongdar løðugrindir*
*ríkmenni níðskir,blindir-*
*í herna móti*
*marglætisgykli*

*stríðseinglar margir í tali*
*-glerheilar í seyðaskinni*
*sjálvsøknis myrkur í sinni-*
*ljóseinglar sigra á vali*

*fagnaðareinglar á ferð*
*-stálhjørtu andsheimin*
*fylla*
*tingsliga trogið fylla-*
*undurverk einglaljómur*
*ger*

*frælsiseinglar gleðiboð*
*bera*
*-ríkmenni søkka í mold*
*bjart skyggir jólafold-*
*í smáttum sóleinglar verða*

*friðareingilin boðini ber*
*-ríkmenni missa valdið*
*innar í armóðstjaldið-*
*sjá leyvur og smalur*
*sáttast her*

*stríðseinglar harðmæltir*
*kvøða*
*-frælsislúðrar-*
*javnrættarandi*
*solidariteturin stinnur*
*standi !-*
*tey kúgaðu kunnu seg frøa*
*!*

*verndareingil ásjón von*
*-á skuggasíðum frøast*
*í sinni nívdu grøðast-*
*í fylgi himna kongason*

**Sólmundur Joensen**
des.-02

# Bók um føroysku blaðsøguna

BÓKAÚTGÁVA




Forlagið Sprotin hevur givið út bókina »Føroyask blaðsøga 1852-2002«, sum Arnbjørn Dalsgarð hevur skrivað.

Í ár eru liðin 150 ár síðani fyrsta avísin kom út í Føroyum. Í hesum sambandi skrivaði Arnbjørn Dalsgarð eina greinarøð í Fregnum, og við hesum tilfari sum grundarlag hevur hann arbeitt víðari.

– Afturat hesum tilfari kemur so eitt útgreinað yvirlit yvir allar avísirnar, sum eg eri komin framá undir kanningararbeiðinum, umframt ein stutt lýsing av tíðindaflutninginum í Føroyum fram til 1852, tá fyrsta prentaða avísin kom út, sigur Arnbjørn Dalsgarð í innganginum í bókini.

Bókin kostar 159 krónur



# Jóladøgurðin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi spardur burtur

**- Men jólahald verður sum vanligt jólaaftan, sigur fyristøðumaðurin, Tordur J. Niclasen**

JÓLATILTØK
*Vilmund Jacobsen*



Tað er komið dátt við hjá búfólkum og avvarðandi á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, at leiðslan í ár hevur avgjørt ikki at skipa fyri tí stóra jólaborðhaldinum, sum hevur verið fastur táttur á hvørjum ári, undantikið eitt skifti fyrst í nítiárunum, tá ið kreppa herjaði alt samfelagið.

Fyristøðumaðurin, Tordur J. Niclasen, harmast eisini um, at neyðugt skuldi vera at taka hesa avgerð, men vísir á, at hetta er ein "konstantering" av givnu umstøðunum í ár.

Hann váttar, at grundgevingin fyri ikki at hava jólaborðhaldið í ár eins og undanfarin, er sparingar.

- Vit hava ein fíggjarkarm, sum vit skulu halda okkum innanfyri og meta ikki, at pláss er fyri hesum tiltaki í ár.

Fyristøðumaðurin vónar tó, at tiltakið kann verða tikið uppaftur komandi ár - til gleði fyri búfólk, teirra avvarðandi og starvsfólkið annars.

- Avgerðin er tikin í samráð við leiðsluna, og búfólk og avvarðandi hava fingið boð um, at jólaborðhaldið verður ikki á hesum sinni.

Eini 200 fólk plaga at vera við til jólaborðhaldið á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, sum hevur verið væl fyriskipað út í minstu smálutir.

- Her hava búfólkini havt høvi at bjóðað tveimum av sínum nærmastu við, og saman við starvsfólkum og teirra avvarðandi hava vit verið eini 200 í tali, sigur Tordur.

Hann vísir á, at búfólkini hava goldið ein part av tiltakinum, men hóast hetta, kostar jólaborðhaldið, sum er eitt stórt tiltak, væl av peningi.

Fyristøðumaðurin sigur, at hann hevur ikki merkt nakað serligt til, at fólk ikki skilja støðuna, men ásannar, at nøkur búfólk hava víst á, at tey harmast um avgerðina.

- Tað geri eg eisini, og eg skilji tey væl, sigur hann.

Hann vísir á, at líka so nógv, sum tey gomlu gleddu seg yvir hetta tiltak - líka so hørm eru tey, nú jólaborðhaldið ikki verður á hesum sinni.

Umframt døgurðan, hevur hetta verið eitt minniligt kvøld á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, við ymiskum undirhaldi og sølu av lutaseðlum.

### Og tó...

Men búfólk og avvarðandi fáa kortini høvi at vera saman á jólum, tí jólaaftan verður gudstænasta, og síðan verður borðreitt við kaffi.

- Her eru øll hjartaliga vælkomin, sigur Tordur.

Hann vísir á, at jólaaftan verður eisini ein serligur døgurði fyri búfólkunum, og eisini tá eru avvarðandi vælkomin at vera saman við teimum gomlu.

- Her verður jólatræ, jólasangir, jólaevangeliið og mandlugreytur, og búfólkini fáa eisini jólagávur, sigur Tordur.

Hann vísir á, at nógvar hugnaløtur eru á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi gjøgnum árið, og í vikuni vitjaðu børn úr Tofta skúla, har tey gingu St. Lucia. Seinni fingu tey greyt og okkurt leskandi.

- Vit hava nógv tiltøk gjøgnum árið fyri búfólkunum og teirra avvarðandi. Jóladøgurðin er bara eitt av hesum, men hann hevur so verið tað størsta tiltakið av sínum slag, sigur fyristøðumaðurin, Tordur J. Niclasen, at enda.

Í komandi blaði fara vit at venda aftur til Tord og Eysturoyar Røktar-og Ellisheim.

# Vælmannað nýggjárskonsert

NÝGGJÁRSKONSERT
*Kyndil*



28. desember skipar Kyndil fyri nýggjárskonsert í høllini á Hálsi. Í ár eru fýra tónleikarabólkar umframt Hanus G. Johansen við, og er alt sum bendir á, at vit fara at fáa eina rimmar nýggjárskonsert í ár

Teir fýra bólkarnir eru:

deja vu: Mannað við ungum evnaríkum tónleikarum, sum allir hava valt at fara uttanlands á tónleikaraskúla fyri at ogna sær størri førleika sum tónleikarar. Deja vu er við á fløguni Livandi tónleikur, sum kom út í summar. Deja vu er millum teir bólkar her á landi, sum ger teir bestu sangirnar (melodiirnar), og eru fólk við innliti samd um, at vit her hava ein lovandi popp/rock bólk.

Krit: Krit er tann bólkurin, sum í løtuni er best umtóktur mllum tey ungu. Teir eru við á nýggjastu fløguni hjá Tutl, og hava teir eisini fyri stuttum gjørt rættiliga vart við seg í Islandi. Krit er mannað við sera ungum tónleikarum, og spæla teir harðan rock.

MC Hár: MC Hár eru kendir fyri nokk so nógv ymist. Teirra ekstravangansu, provokatiónir, pallshow við dansi o.ø. Ein sera livandi og undirhaldandi bólkur, sum spælir harðan men glaðan rock. Tú kanst altíð rokna við onkrum serligum, onkrum óvæntaðum, tá MC Hár er við, men tú hevur allíkavæl onga hóming av, hvørjum teir nú koma við. Tó kanst tú vera vísur í, at onkur provokatión er á skrá. Tí siga vit: Eingin rættiliga rockkonsert í Havn uttan MC Hár.

Tangz: Tangz vóru nógv frammi í samband við Prix Føroyar, men hava vit ikki hoyrt so nógv til teirra seinastu tíðina. Men teir trína nú aftur á pall við sínum rock tónleiki við ikki sørt av funk blandað í. Tangz man vera orkestrið um okkara leiðir, ið spælir og ger tann mest orginalan tónleikin. Annað sum eyðkennir bólkin er, at teir eru stak góðir tónleikarar.

Hanus G. Johansen: Hanus er ein av okkara tónleikaralegendum, sum bergtekur við sínum sermerkta sanghátti og sínum sermerkta sangvali. Líka sum Evert Taube syngur Bellmann, so syngur Hanus um Poul F. Hanus er altíð góður, og borgar tað fyri góðsku, at hann er við.

Ikki dýrt

Tað fer ikki at kosta nógv at fara til nýggjárskonsert í ár. Kyndil hevur sett atgongumerkjaprísin til 100 krónur í forsølu og 120 krónur við dyrnar. Hetta fyri at geva so nógvum til ber møguleikan at sleppa til konsertina.

Atgongumerkini er løgd til sølu á øllum Shellstøðum kring landið, Kiosk Vár í Saltangará, Kunningarstovuni í Havn og 3-aranum í SMS.

Bussar koyra

Tað ber til hjá øðrum enn havnafólki at fara á nýggjárskonsert. Bussur koyrir úr Sørvági klokkan 23.00, úr Vestmanna 23.30. Hesin bussurin fer aftur úr Miðbýnum (við City) klokkan 04.30.

Bussur fer úr Fuglafirði 22.30, og støðgar hesin á øllum vanligum støðgistøðum á veg til Havnar. Hesin bussurin fer frá aftur høllini á Hálsi klokkan 04.00.

